## Makelele til Paris SG

35 ára gamli Claude Makelele skiftir frá Chelsea til franska felagið Paris SG. Hetta eitt ár áðrenn sáttmálin við Londonfelagið gekk út. Tað boðar franska felagið frá í morgun. Makelele skifti frá Real Madrid til Chelsea fyri 170 milliónir krónur, og spældi 144 dystir fyri felagið, har hann gjørdi tvey mál. Sambært heimasíðuni bold.dk hevur franskmaðurin ikki verið so glaður fyri tilveruna í London, eftir at portogisiski venjarin José Mourinho fekk sekkin síðsta kappingarár.



## Hamilton fremstur á Hockenheim

Eina løtu sá tað út til, at ein sensatión av teimum heilt stóru skuldi vera á Hockenheim bananum í Týsklandi sunnudagin, har Formel 1 koyring var. Tað endaði tó við, at 23 ára gamli Lewis Hamilton yvirhálaði Nelson Piquet Jr. sjey umfør alt var av, og sostatt endaði bretski McLaren koyrarin ovast á sigursskamlinum. Hetta var tó á ongan hátt óvæntað, tá Lewis Hamilton hevur koyrt rættiliga sannførandi í ár. Óvæntað var tað tó, at Nelson Piquet Jr. endaði so frammaliga. Brasiliumaðurin hjá Renault byrjaði koyringina sum nummar 17, men vann seg heilt fram á eitt annað pláss, og lá eina løtu eisini fremstur í koyringini. Í samlaðu støðuni hevur hetta við sær, at Hamilton nú er fýra stig frammanfyri Massa, sum gjørdist nummar trý sunnudagin.

# Dramatiskur endi í G



*Torkil Veyhe og Hafsteinn Ægir Geirsson í ávikavist fjallatroyggjuni og bláu føraratroyggjuni. Hóast Torkil vann sunnudagin, vann Hafsteinn samanlagt, so teir kundu fara til hús í somu troyggjum, sum teir súkklaðu í sunnudagin*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen / Einslistir*

**Tað gjørdist til ein dramatiskan spurt í Gundadali í gjár, tá súkklukappingin Statoil Kring Føroyar endaði. Torkil Veyhe yvirhálaði Hafsteinn Ægir Geirsson í síðsta svinginum við Bridgehúsið og megnaði sostatt í evstu løtu at smoyggja sær fram-um, bert fáar metrar frá mállinjuni. Hafsteinn vann kortini kappingina samanlagt**

SÚKKLING
*Hilmar Jan Hansen*

Teir 2-300 áskoðararnir, sum vóru komnir til Statoilstøðina í Gundadali at fylgja við endanum á stóru súkklukappingini Statoil Kring Føroyar, fingu undirhald til tað síðsta, tá teir bli-vu vitni til ein sera spennandi endaspurt millum teir báðar fremstu súkklararnar, Hafsteinn Ægir Geirsson og Torkil Veyhe.

Á veg oman frá Áargeil eftir Gundadalsvegnum var Hafsteinn tann fremri, men í síðsta svinginum setti Torkil trumfin á og yvirhálaði innanfyri, so tað eydnaðist honum at fáa smoygt sær framum og hildið fast, líka til komið var um mállinjuna. So tætt var millum teirra, at tíðin tó var tann sama.

Í góðveðrinum í gjár var tíðin upp á tríggjar tímar, seks minuttir og 30 sekund eisini tann næstbesta, sum hevur verið, síðani farið var undir at brúka 109 kilometra langa teinin úr Tjørnuvík, umvegis Saksun og Gomlurætt, áðrenn trý umfør verða súkklað í Havnini.

Serliga stuttligt var tað hjá súkklarunum, at fólk stóð fram við vegnum fleiri staðni á teininum, og eitt nú í Hvalvík og Streymnesi stóðu børn við fløggum og fagnaðu súkklarunum. Tað var ikki sørt, at tað minti um myndirnar, vit plaga at síggja frá Tour de France og teimum stóru kappingunum.

### Bjóðaðu av

Tað skiltist á øllum brøgdum longu frá byrjan, at onkur fór at bjóða av á síðsta teininum, tí mestsum beinanvegin royndu súkklarar at sleppa frá hinum. Og longu á Langasandi høvdu tríggir súkklarar fingið eitt fitt petti millum seg og hinar, og tað var ikki sørt, at sensatiónin lá og lúrdi.

Eli J. Christiansen, Áslakkur Nesá og Kjartan Egholm sluppu avstað, og teir bara øktu um frástøðuna aftur til restina av feltinum allan vegin suður gjøgnum Sundalagið. Men so við og við gjørdist ófriðarligt longur afturi, har fleiri royndu

## Statoil Kring Føroyar 2008

**Endaliga støðan eftir 324 kilometrar:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Hafsteinn Ægir Geirsson | 09:52:30 |
| 2. | Torkil Veyhe | +00:01:58 |
| 3. | Gudmundur Joensen | +00:14:21 |
| 4. | Eli J. Christiansen | +00:21:28 |
| 5. | Áslakkur Nesá | +00:24:24 |
| 6. | Gunnar Dahl-Olsen | +00:25:16 |
| 7. | Kjartan Egholm | +00:27:56 |
| 8. | Gunnlaugur Jónasson | +00:35:56 |
| 9. | Andrass Joensen | +00:47:57 |
| 10. | Sverri Mohr Edvinsson | +01:06:13 |
| 11. | Jón Bogason Ellingsgaard | +01:28:55 |
| 12. | Durita Holm | +01:40:18 |
| 13. | Evald Rasmussen | +03:29:51 |